# í juni




minni enn fyri einki at finna, so eru vónirnar soleiðis, at gongur ikki sum vónað og ætlað, so verður man vónsvikin. Og tí fer tað at hava eina negativa effekt beint eftir eina turra boring, men vit vita eisini, hvat vit hava av potentiali uppá longri sikt at royna eftir, og tí vænti eg heldur ikki, at vónbrotið fer at vara so øgiliga leingi, um tað skuldi verið so.

### Fleiri skot í byrsuni

– Hetta er so ikki seinasta skotið í byrsuni. Tit hava jú eisini tveir Statoilbrunnar á skránni.

– Vit vóru sera fegnir um, at Statoil saman við øðrum feløgum átók sær at bora tveir brunnar aftrat. Og tað er sjálvandi við til at halda áhuganum fyri økinum uppi. Skuldi tað hent, at hesin brunnurin, sum ENI borar, ikki innihelt tað stóra, so er tað nógv betri at vera í tí støðu, at tveir brunnar standa og bíða.

*jan@sosialurin.fo*



*Petur Joensen og Meinhard Eliassen á Jarðfeingi*
*Mynd Jan Müller*

# Rætt at minna oljufeløg á treytirnar

**KRØV – Eg haldi vit saktans kunnu vera betjent at minna oljufeløgini á, hvørjar treytirnar eru, og at tær skulu fylgjast, men tað er eisini ein ballansugongd sigur stjórin á Jarðfeingi**

Jan Müller

> **Tað vit frá Jarðfeingi leggja allarstørstan dent á, er, at boringin verður framd væl og virðiliga, og at hon verður gjørd trygt.**

Enn ein brunnur skal borast á landgrunninum. Ein partur av føroysku krøvunum til oljufeløgini er, at tey skulu brúka føroyskar vørur og tænastur í tann mun tey eru kappingarfør. Í hvønn mun brúkar ENI føroyskar vørur og tænastur, nú tað fer at bora aftur á landgrunninum spurdu vit stjóran á Jarðfeingi, Petur Joensen.

– Nú er tað altíð so, at vit kundu ynskt okkum, at tað var meira, men soleiðis sum regluverkið er skrúvað saman, hevur man valt, at føroyskar fyritøkur skulu hava ein møguleika fyri at bjóða, men at tær skulu vera kappingarførar. Og tað er ikki lætt. Tær verða við í nøkrum førum, men vit kundu altíð ynskt okkum, at tað var eitt sindur meira.

*– Men kunnu tit ikki seta teimum strangari krøv?*

– Tað vil altíð vera ein javnvág. Tað vit á Jarðfeingi leggja allarstørstan dent á er, at boringin verður framd væl og virðiliga, og at hon verður gjørd trygt. Vit kunnu illa blanda okkum meira uppí tað enn, at feløgini geva føroyingum ein møguleika, har tey hava møguleika at vera við. Av teimum stóru uppgávunum eru t.d. flúgving, supplybátar og útgerðarstøðin. Har gevur tað seg sjálvt, tí tað er eitt lógarkrav, at vørur skulu um føroyskan kaikant. Annars eru tað smærri sáttmálar, sum talan kann vera um.

### Ballansugongd

*– Er tíðin komin til at endurskoða okkara reglar og kanska seta oljufeløgunum harðari treytir um nettup at brúka føroyska vørur og tænastur meira?*

– Eg haldi vit saktans kunnu vera betjentir at minna tey væl og virðiliga á, at hetta eru treytirnar, og at tær skulu fylgjast, men tað er eisini ein ballansugongd. Tað vit hava við at gera eru ikki nøkur anonym feløg men tað eru fólk. Seta vit teimum alt ov stór krøv, at tey føla, at Føroyar eru eitt heldur torført land at arbeiða í, so kann tað hava eitt sindur av negativari ávirkan.

Petur Joensen sigur víðari, at tað kann gott vera, at vit skuldu stramma eitt sindur til. Hinvegin er tað eisini avmarkað, hvat vit hava av føroyskum fyritøkum, tí nógvar av uppgávunum eru sera specialieraðar uppgávur. Og haraftrat kemur enn ein avbjóðing, sum føroyskar fyritøkur hava, nevniliga at tað er so langt millum boringarnar. Ein kann ikki vænta, at tær skulu vera klárar annað og triðja hvørt ár til, at nú skulu tær giera seg til eina oljuboring. Og hetta er so nakað, sum vit mugu taka hædd fyri sigur stjórin á Jarðfeingi.

*jan@sosialurin.fo*